DAGSINS MEINING

Fólkatingsval – løgtingsval

Hóast fólkatingsval og løgtingsval eru tvey ymisk val, bendir nógv á, at fólkatingsvalið í stóran mun er ein upphiting til eitt løgtingsval. Hetta hevur ikki altíð verið so, og kanska serstakliga er hetta galdandi fyri valini hesaferð. Eitt nú tí spurningarnir, sum verða tiknir fram til hetta fólkatingsvalið eru og verða teir somu, sum man fer at viðgera til komandi løgtingsval. Her ikki minst spurningar, sum snúgva seg um sjálvstýristilgongdina og vælferðina.

Hvat vit so enn halda um týdningin av hesum fólkatingsvalinum, so verður tað áhugavert at síggja úrslitið, tí tað fer at geva eina ábending um, hvussu eitt møguligt løgtingsval fer at laga seg. Tað er rætt sum samfelagsfrøðingurin sigur við blaðið í gjár, at val til fólkatingið hevur verið meira ein spurningur um persónar, tó at tað hesaferð er broytt í og við at tjóðskaparspurningurin er vorðin so sentralur. Men nettup tí hesin spurningurin er vorðin so týðandi fyri allar flokkar longu til fólkatingsvalið kunnu vit eisini rokna við, at ein útmelding frá veljarunum um nettup tjóðskapar- ella sjálvstýrisspurningin fer at geva eina týðuliga mynd av, hvussu eitt komandi løgting fer at síggja út.

Vit mugu so heldur ikki gloyma, at umframt sjálvstýrisspurningin fara bæði valini uttan iva at snúgva seg um vælferðina. Tað hava í hvussu er báðir stóru andstøðuflokkarnir meldað út við. Meðan Javnaðarflokkurin tosar um fólkið hevur Sambandsflokkurin lagt út við at tosa um tey eldru. Hesir báðir andstøðuflokkarnir vilja við hesum vísa á, at verandi samgonga hevur fokuserað so nógv uppá fullveldistilgongdina, at onnur gerandismál eru burturgloymd ella eru raðfest ov aftarliga.

NÚ nevndi løgmaður í sjónvarpinum, hvussu nógvan pening hetta landsstýrið hevur játtað til eitt nú almannamál. Neyvan sigur løgmaður ósætt um hetta, men hetta er so bara ikki allur sannleikin. Tí veruleikin er tann, at ongantíð hevur samfelagið verið so ríkt sum nú, ongantíð hevur fíggjarlógin verið so væl fyri sum nú og ongantíð eru so nógvir pengar lagdir til síðis sum nú. Alt gott um tað. Men samtíðis er tað ein sannroynd, at vit hava eitt heilsuverk, sum koyrir uppá pumpurnar, t.d. er ikki meira til raksturin av sjúkrahúsinum í dag enn tað var fyri nógvum árum síðani, so pengarnir eru farnir til lønarhækkingar aleina. Starvsfólkini eru framvegis ovbyrjað eftir at náttúrligi vøksturin í rakstrinum varð steðgaður frá politiskari síðu og kunnu stovnarnir ikki veita ta optimalu tænasturnar, sum áttu at verið ein sjálvfylgja í einum vælferðarsamfelag sum okkara. Skúlaverkið er niðurslitið og soleiðis kundi verið hildið fram. So spurningarnir til fólkatingsvalið og løgtingsvalini verða hesir somu: sjálvstýristilgongdin og vælferðin.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eisini tit, Fregnir?

Heðin Mortensen
ÍSF-forseti

Vanligt er, tá fólk vera óvæntað álopin, at taka til orðini: eisini tú, sonur mín Brutus.

Í seinastuni hevur mentunarblaðið Fregnir skrivað eina greinarød ímóti føroyskari olympiskari viðurkenning.

Søgan um føroyska olympiska viðurkenning er í stuttum henda. Miðskeiðis í 80'unum tekur ÍSF stig til at arbeiða fram ímóti føroyskari luttøku á olympisku leikunum.

Tað er olympiska rørslan, ið skipar fyri olympisku leikunum. Olympiska rørslan er ein óheftur felagskapur, óheftur av politiskum stjórnum og øllum øðrum almennum, privatum og átrúnaðarligum áhugamálum.

Ovasti myndugleiki hjá olympisku rørsluni er IOC, International Olympic Council, tað olympiska ráðið. Limirnir í IOC eru einstaklingar, sum IOC sjálvt velur. Limirnir umboða ikki heimlond síni í ráðnum.

Olympiska ráðið viðurkennir síðani altjóða sersambond, herímillum t.d. FIFA, atljóða fótboltsambandið. Ráðið viðurkennir fleirítróttarsambond, t.d. altjóða ítróttarsambandið fyri brekað International Paralympic Organisation.

Loksins viðurkennir IOC eitt ítróttarsamband úr hvørji landi, sum lýkur treytirnar fyri viðurkenning. Fremstu treytirnar fyri viðurkenning eru, at ítróttarsambandið umboðar sersambond og fleirítróttarsambond, ið hava vunnið sær viðurkenning frá altjóða sersambondunum.

Men, sjálvsagt er ein spurningur, hvat er eitt land í olympiskum høpi? Av teimum um 200 viðurkendu ítróttarsambondunum eru 12 úr londum, hvørs ríkisrættarliga støða minnir um støðuna hjá Føroyum. Harafturat hevur ÍSF fullan stuðul frá danska ítróttarsambandinum, so ongin ivi er um, hvør umboðar Føroyar í olympiskum høpi.

Men fremsta treytin er viðurkenningin, sum føroysku sersambondini hava fingið. Tað er tann viðurkenningin, sum ger, at FSF kann senda lið at umboða Føroyar í fótbóltskappingum, at ÍSB svimjarar fáa heiðursmerki handaði, meðan merkið veitrar og tjóðsangurin ljóðmar.

Politiska eindin Føroyar og føroysku stjórnarstovnarnir, løgting og landsstýri, fáa ikki olympiska viðurkenning, men ítróttarsambandið, sum í umveldi er samanfallandi við landið Føroyar.

Tá Heri Simonsen á Fregnum sigur, at vit ístaðin áttu at spælt "Hon er omma mín" er tað púra burturvið. Somuleiðis er tað fullkomiliga misskilt at rokna frástøðuna millum USA og Guam sum avgerandi ella at leggja inn treyt um viðurkenning frá teimum europeisku londunum.

Føroyingar halda fast um tjóðsangin og merkið, og teir sleppa av kappast í olympisku leikunum vegna Føroyar, um ÍSF fær viðurkenning frá olympiska ráðnum.

Tað nyttar ikki at halda fram við hesum kjaki, sum tí endar her. Í mun til Fregnir ger ÍSF heimaarbeiðið til lýtar og fær tí væntandi olympiska viðurkenning. Eftir situr lesarin hjá Fregnum og spyr seg sjálvan, um alt tilfarið í blaðnum er líka ófyrireikað og tendensiøst.

Eftirlønirnar hjá landsstýrismonnum verða ikki broyttar...

Eivind Jacobsen
Olav Enomoto
Michael Jensen
Finnur Jensen

Eingin hevur enn gjørt nakað við eftirlønirnar, sum skuldu virka við afturvirkandi kraft. Landsstýrismenn játtaðu sær sjálvum hægri eftirløn uttan hóvasták fyrr í ár. 1. januar verður lógin sett í gildið.

Í Mai samtykti løgtingið pensjónir til Landsstýrismenn. Sambandsposturin gjørdi beinan veg vart við, at lógin var púra burturvið. 14 juli gjørdu vit vart við hetta í fjølmiðunum. Hetta fekk alt landið upp úr stólunum. Næstu vikuna kundi tú hvørki gloppa eitt blað ella tendra loftmiðil, uttan at málið var á skránni.

Meðan onkur arbeiðaravinur royndi at verja lógina, royndu tveir samgonguflokkar seg við tíðindaskrivi og reklamuherferð, fyri at bjarga tí, sum bjargast kundi. Hægsti maður royndi at slætta sjógv sum altíð, hóast klárt sást, at hann ongan hug hevði at broyta lógina.

Nú 3 mánar eru farnir er einki hent. Hendan skilaleysa lóg er framvegis galdandi og hendur einki kemur hon í gildi á nýggjárinum. Tit lovaðu at málið skuldi avgreiðast skjótt og væl. Hvar er trúvirðið.

Hetta eru teir menn, sum fyri borgum ráða. Hesir bjóða seg í dag fram fyri veljaranum. Onkur sigur, at uppskot er klárt. Løgmaður sigur, at einki uppskot verður lagt fram, fyrr enn semja er í samgonguni. Tað nyttar lítið at hava uppskot klár, sum ikki fáa undirtøku. Tí ivast vit í um teir meintu nakað av tí teir søgdu í juli

Vælsignaðir menn. Tað er val í hondum. Tá plaga sjálvt teir dovnastu politikararnir at fáa okkurt av skafti. Hvat bíða til eftir? Er tað so livandi galið, at tit ikki vilja broyta lógina? Er tað so galið, at tit ikki hava ráð at frásiga tykkum tað, sum tit enn ikki hava fingið?

P.S. Hetta er ikki meint at verða partapolitiskt, men partar av samgonguni ella øll samgongan váttaðu í juli at lógin bleiv broytt skjótast gjørligt. Um lógin skal broytast áðrenn 1. januar, má hon leggjast fram beinan veg. Tað tekur langa tíð at fáa eina lóg samtykta.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Børnini og bíðilistin

Starvsfólkið á Dagstovninum í Hoyvík

Tórshavnar Kommuna hevur fyri kortum broytt upptøkureglurnar um ansingarpláss. Í staðin fyri at hyggja eftir kyni og aldri á barninum, verður nú fyrst og fremst hugt eftir, hvat nummar barnið er á bíðilistanum, og so kemur alt annað í aðru rað. Foreldrini eru sjálvandi fegin um, at barn teirra fær eitt stovnspláss, tá tað stendur nr. 1 á listanum, og at ikki eitt barn, sum kanska stendur nr. 5 á listanum sleppur fram um, men vit sum starvsfólk á einum stovni síggja nakrar óðrar trupulleikar, sum ikki vísa seg fyrr enn barnið hevur fingið eitt pláss.

Tað kann t.d. vera, at barnið hevur fingið eitt pláss á einum øðrum stovni enn systkin síni, at ongir javnaldrar eru, ella at barnið noyðist at ganga í vøggustovu inntil tað er 4 ella 5 ár. Um vit skulu sleppa undan hesum, halda vit at tað er neyðugt at hyggja at tørvinum hjá tí einstøku familjuni í samstarvi við stovnunum, og tá kann tað gerast neyðugt at taka okkurt barn fram um tí, sum stendur nr. 1 á listanum.

Nú vil onkur kanska siga, at tað er órættvíst, at nøkur børn skulu sleppa fram um onnur, bara tí at teirra barn ikki hevur rætta kyni ella aldur, men tað sum vit síggja er, at táið nú børnini hava fingið eitt pláss, byrja foreldrini at seta spurningar og krøv til stovnin og starvsfólkini (tað skulu tey eisini). Tað, sum hendir er, at hugburðurin hjá foreldrunum broytist, tá tey hava fingið eitt pláss. Nú fara tey at hugsa um kvalitetin á stovninum - hevur barnið tað gott, fær tað nóg nógvar avbjóðingar, eru nakrir javnaldrar o.s.fr.

Í Dagstovninum í Hoyvík eru 3 vøggustovur og 3 barnagarðar við íalt 72 børnum. Longu nú síggja vit, at børnini í vøggustovunum um fá ár verða bæði 4 og 5 ár, áðrenn tey sleppa yvirum í barnagarð. Sum eitt konkret dømi kann sigast, at í einari vøggustovu, har tað ganga 10 børn í aldrinum 0-3 ár, verða í 2004 tvey 5 ára gomul børn og fýra 4 ára gomul børn. Hesi 6 børnini áttu at verið farin í barnagarð í ávíkavist 2002 og 2003, men sleppa ikki, av tí at onki pláss er í barnagarðinum fyrr enn ár 2004. Tað ber við sær, at vøggustovurnar í ár 2004 fáa alt ov nógv nýggj børn ísenn, sum skulu integrerast, og tað er sera ónøktandi, bæði fyri børn, foreldur og starvsfólk. Børnini í barnagørðunum verða tískil eisini eldri og eldri, og kann tað enda eina viðk, at bert 5-6 ára gomul børn ganga í barnagarðinum.

Savnsmynd

Familjupolitikkur

Vanligt hevur verið, at systkin sleppa á sama stovn, men um bert verður gingið eftir nummarinum á listanum, verður ikki tikið hædd fyri hesum. Hetta halda vit er stórt spell, av tí at systkini kunnu njóta nógv gott av hvørjum øðrum, umframt at hetta er ein tryggleiki hjá børnunum, tí tey síggja ikki foreldrini aftur fyrr enn 7, 8 ella 9 tímar seinni.

Familjan í okkara samfelagi í dag er so spjadd frammanundan, og hetta ger tað bara verri, so vit seta tí spurning við, hvønn familjupolitik, býráðið rekur - ella hvass teir yvirhøvur nakran familjupolitik? Hvussu vil býráðið, at børn okkara, sum jú er okkara framtíð, skulu mennast til at gerast ábyrgdarfullir borgarar her í høvuðsstaðnum?

5 ára gomul í vøggustovu

Ein onnur avleiðing er sum sagt, at børnini, sum ganga í vøggustovu, ikki sleppa í barnagarð, tá tey verða 3 ár, men koma at bíða eitt ella tvey ár. Tí seta vit nakrar spurningar til býráðið. Hvat hendir við hesum børnunum? Skulu tey ganga í vøggustovu til tey eru 5 ár? Og hvør skal gjalda fyri tann eyka kostnaðin, sum tað kostar fyri eitt vøggustovupláss? Ella ynskir býráðið at niðurleggja vøggustovurnar?

Í dag er prísurin fyri eitt vøggustovupláss uml. 2.100 kr. og eitt barnagarðspláss uml. 1.400 kr., so um eini foreldur have eitt 4 ára gamalt "vøggustovubarn", sum ikki sleppur í barnagarð, fáa tey eina meirútreiðslu uppá 700 kr. um mánaðin, tvs. 7.700 kr um árið fyri eitt barn!

Foreldrini royna kanska at finna aðrar loysnir, men spurningurin er bara, hvussu nógv skift skal man bjóða einum menniskja, tá man veit, at børn allarmest ikki er nøktandi, og vilja vit tí siga okkara hugsan. Tað versta er kanska, at býráðspolitikarnir hava spurt okkum um ráð, men hvat teir hava brúkt tað til, vita vit ikki! Eru spurningarnir bert eitt eiti?

Fyri okkum sær tað út sum um, at nakrir politikarar bert hugsa um at fáa atkvøður frá okkum foreldrum (vit eru jú eisini foreldur!), og so kunnu avleiðingarnar bara koma seinni.

Vit vilja tí fegin hava at vita, hvørjar stutttíðar- og langtíðarætlanir býráðið hevur viðvíkjandi umsitingini av ansingarplássunum. Eisini vilja vit hava grundgeving fyri hví.

Harumfram vilja vit eisini vita, hvussu býráðið raðfestir kvalitet á stovnunum, ella um tað bert er umráðandi, at foreldrini (stuttsikta) gerast nøgd, við tað at tey fáa eitt stovnspláss?

Neyðugt at gera undantøk

Fyri at venda aftur til bíðilistan, eru vit klár yvir, at hetta er ein trupul uppgáva at umsita, men samstundis halda vit, at tað er neyðugt at gera undantøk, soleiðis at stovnarnir alla tíðina hava børn býtt sundur í ymiskum aldursbólkum, og at familjan er samlað. Tað kann sjálvandi vera sera trupult at skilja, at onkur annar fær eitt stovnspláss, sjálvt um tú stendur nr. 1 á listanum, men tað er neyðugt, um tú skalt taka hædd fyri tíni medmenniskju, og hetta er nakað, vit læra líka frá barnsbeini av. Verðin er sera komplisera - nær er hon rættvís fyri okkum øll?

Ein spurningur ein kann seta sær sjálvum er tí: "Fái eg bestu loysnina, tá eg standi nr. 1, ella kann tað løna seg at bíða?"

Tí er ein sera góður eginleiki at gleðast vegna onnur, sjálvt um tú ynskir tær tað sama!

Vit halda tó, at tað er positivt, at fleiri nýggir stovnar eru í gerð, sjálvt um byggiavtalan kann vera diskutabul, men tað koma vit ikki nærri inn á her. Vit vóna sjálvandi, at hetta fer at gera tað, at bíðilistin minkar, men tað fer óivað at taka nógv ár, tí enn er tilflytingin stór til høvuðsstaðarøkið. Tað kann tó eisini vera ein vansi við at byggja ov nógvar stovnar, um nú barnatali lækkar einaferð í framtíðini. Tí vilja vit ráða til at byggja stovnar, sum eisini kunnu brúkast til onnur endamál - t.d. ungdómsíbúðir, vardar íbúðir, eldrasambýli o.s.fr. Við hesum vísa tit á býráðnum ábyrgd, við tað, at tit hava eina langtíðarætlan, og vit vóna eisini, at tit taka ábyrgd við at endurskoða upptøkureglurnar, soleiðis at tær gerast nøktandi fyri allar partar við framtíðini í huga.

Lættari at stýra einum landi - enn at stýra sær sjálvum

Karin Kjølbro
stillari tjóðveldisfloksins

Valstríðið til fólkatingsvalið verður stutt. Tað er ikki bert ein fyrimunur fyri tey, ið stríðast fyri sessunum, men eisini okkum veljarar. Tjóðveldisflokkurin kunngjørdi sum hin fyrsti lista og valskrá. Úrslitið gjørdist, at hinir flokkarnir løgdu eina valskrá, ið í nógvar mátar er eitt aftursvar til tjóðveldisflokkin.

Til seinasta løgtingsval gjørdist flokkurin hin størsti í landinum, og í hesum valskeiði fekk flokkurin nýggjan formann. Hóast miklan ágang frá øllum síðum er tað eyðnast tjóðveldisflokkinum alsamt at vera hin størsti flokkurin til allar veljarakanningar síðani.

Høgni Hoydal hevur megnað at byggja brúgv millum tey, ið stovnaðu flokkin fyri stívliga hálvthundrað árum síðani og annað og triðja ættarlið. Øll, ið vilja framat í politikki munnu hugsa um, hvussu tað letur seg gera at fremja slík avrik Svarið er: Altíð væl fyrireikaður, skilagóður, siðiligur og høviskur - hann letur seg ikki øsa, dugur at stýra sær.

Nú er so fyrsta veljarakanning kunngjørd eftir at valið er útskrivað. Okkurt bendir á, at fjáltur er á onkrum flokki. Slíkt kann lætt føra við sær hart valstríð, har onkur ella fleiri av valevnum floksins fara at kenna seg provokeraðan. Væl verið tykkum valevnum floksins; missið ikki tamarhaldið á tykkum, mong hava verið noydd at ásanna, at forrent er ikki at kunna tiga við afturvirkandi kraft.

Umráðandi er við virðiligum hampafólki á fólkatingi, men tað er eisini alneyðugt at øll umboð floksins duga at liva og virka í løgtinginum og allastaðni í Føroyum. Í mong ár hava nógv kent andstygd og vaml fyri tí, ið oyra má hoyra úr Føroya Løgtingi. Tí eru mong, ið ikki vita, hvat tey skulu eins og bólkur teirra, ið ætla at sita heima - helst av somu grund - er alt ov stórur.

Kæru tit 18, ið eru á lista tjóðveldisfloksins til fólkatingsvalið. Tit hava eina góða søk. Setið ljóskastaran á hana og bert hana. Fylgja tit atburðarlagi formansins kunnu tit meðvirka í, at flokkurin ikki bert er størsti flokkur, men gerst ein fólkafylking.

Eg vóni, at tit, ið stilla upp fyri fyrstu ferð kenna tykkum væl í Tjóðveldisflokkinum.

Latið børn tykkara og okkum, ið undan hava gingið, og sum nú ganga aftaná tykkum kunna rætta ryggin og verða errin av tykkum og latið okkum liva tann dag, tá tjóðveldið Føroyar fær pláss millum heimsins tjóðir.

Gott val!